## Friðarligt sunnunátt

Sunnunáttin var ein av teimum heilt friðarligu hjá løgregluni kring landið. Løgreglan í Havn sigur, at fitt av fólki var í býnum og okkurt smávegis ófriður stóðst burtur úr, men ikki meiri enn so, enn at truplleikarnir vórðu loystir á staðnum, at kalla í friði og náðum, sigur løgreglan.




## Minkingin stendur við

Tey nýggjastu tølini fyri okkara útflutning, vísa, at tann gongdin, sum vísti seg fyrr í ár stendur við. Og tað er vit framvegis útflyta minni í ár enn vit gjørdu í fjør. Tað sigur Hagstovan á heimasíðu síni. Tilsamans útfluttu vit fyri 2,3 milliardir teir fyrstu sjey mánaðirnar í ár, aftur ímóti 2,4 milliardir í sama tíðarskeiði í fjør. Sostatt er talan um eina minking upp á  5%. Men verða skipini ikki tikin við, er talan um eina minking upp á 17%. Minkingin er stór fyri flest øll fiskasløg, men í mestan mun er tað alifiskurin, sum vigar positiva vegin. Nú er útflutningsvirðið av laksi hægri enn fyri nakað annað fiskaslag, og fyrstu sjey mánaðirnar í ár er útflutt fyri 433 milliónir av laksi. Somu tíð í fjør var tað toskurin, sum hevði størst útflutningsvirði, sigur Hagstovan



*- Eg havi onki funnið, sum gevur løgmanni ræðið á ognunum í Tinganesi. Men undir øllum umstøðum kann hann ikki leggja hald á eina skrivstovu hjá einum øðrum landsstýrið frá degi til dags. Verjan hjá løgmanni er nokk so veik og tilgjørt, heldur Bjørn á Heygum, løgfrøðingur, sum var við at smíða stýrisskipanina*

### Bindandi avtala

Tá ið samgongan varð skipað, gjørdi Høgni Hoydal og løgmaður ein skrivliga avtalu um, hvussu høli og starvsfólk í Tinganesi skulu býtast ímillum uttanríkisráðið og løgmálaráðið.

Ráðgevarin hjá løgmanni staðfestir, at talan einans er um eitt ætlanarskriv og ikki um eina formliga avtalu, sum er løgfrøðiliga bindandi.

Her er Bjørn á Heygum slett ikki samdur.

- Tað er í øllum førum ikki eitt ætlanarskriv. Tað stendur beinleiðis, at talan er um eina semju.

- Og tá ið talan er um eina semju, má hon sigast upp, áðrenn nøkur stig verða tikin, tí avtalan er í gildi, til hon er søgd upp. Men í hesum føri varð hald lagt á skrivstovuna, áðrenn avtalan varð søgd upp og tað ber ikki til.

- Men skuldi endaliga niðurstøðan verið, at løgmaður hevur ræðisrættin á ognunum í Tinganesi, kann hann kortini ikki bara taka eina skrivstovu, sum uttanríkisráðið hevur rætt til eftir avtaluni.

- Tað er ongin ivi um, at semjan er galdandi til hon formliga er sett úr gildi og í øllum førum kann hon ikki sigast upp frá degi til dags. Talan má vera um eina hóskandi freist, so at uttanríkisráðið fær stundir til at flyta úr skrivstovuni við sínum fólkum og sínum skjølum, sigur Bjørn á Heygum.

Men eitt heilt annað er so tað, at hóast løgmaður og varaløgmaður eru ósamdir um eina skrivstovu, kunnu løgmansskrivstovan og uttanríkisráðið so bara hvør í sínum lagi bróta seg inn á skrivstovuna, fyri at brúka eina vending, sum hevur verið frammi í almennu skjølunum?

- Nei, hetta tykist mær at vera nokk so ósiviliserað framferð.

Bjørn á Heygum sigur, at her um okkara leiðir, bróta vit ikki bara inn til hvønn annan, hóast vit eru ósamd um eina skrivstovu, eini hús, ein bil, ein bát, ella, hvat tað skal vera.

- Hetta er ein óvirðilig framferð, leggur Bjørn á Heygum afturat.

# Føroyingar gera sítt til at oyða ozonlagið

**Aftur ímóti øðrum londum, brúka føroyingar rættiliga nógv freon, sum oyðileggur ozonlagið rundan um jørðina og tað vil Umhvørvisstovan hava politikararnar at gera nakað við. Ein orsøk er helst, at ozon-oyðandi freon er nógv bíligari enn tað vandaleysa slagið, so her er peningur at vinna upp á at dálka umhvørvið**

UMHVØRVISDÁLKING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Vit í Føroyum gera okkara besta fyri at oyða ozonlagið rundan um jørðina.

Tað skilst á eini frágreiðing, sum Umhvørvisstovan hevur gjørt.

Frágreiðingin vísir, at aftur ímóti okkara grannalondum, brúka føroyingar rættiliga nógv ozonoyðandi evni í okkara ídnaði.

Freon verður brúkt í køliskipanum og tað eru serliga skip, sum brúka nógv freon, ella HCFC-22, sum tað eitur fakmáli.

Umhvørvisstovan sigur, at í fjør innfluttu Føroyar 3,1 ODP-tons av ozonoyðandi evnum.

ODP er ensk stytting fyri ozonoyðandi megi.

- Hetta er stór nøgd samanborið við Ísland og Noreg, sum í 2007 brúktu ávikavist 2,2 og 17,5 ODP tons hóast londini eru nógv størri enn vit, siga tey á Umhvørvisstovuni.

Tey siga, at í ár er fyrstu ferð, at næstan allir innflytarar hava latið upplýsingar inn um innflutning av ozonoyðandi evnum og tí er uppgerðin meira fullfíggjað enn undanfarin ár. Sostatt hava tølini fyri undanfarin ár verið lág og kunnu av tí sama heldur ikki reiðiliga samanberast við í ár. Men er kortini ein ábending um, at nýtslan er vaksin.

### Nógv mest til skip

Kanningin hjá Umhvørvisstovuni vísir, at 68% av innflutninginum av freon varð selt til føroysk skip, 17% vórðu seld til útlendsk skip og 14% vórðu nýtt til onnur endamál á landi.

Tey kannaðu eisini um tað freon, sum varð innflutt, var nýframleitt ella endurvunnið og har var svarið púra greitt: Talan er einans um nýframleitt freon.

- Endurvunnið freon kostar tríggjar til fýra ferðir so nógv sum nýtt freon og tann lági prísurin er helst ein orsøk til, at Føroyar brúka so nógv ozonoyðandi evni samanborið við grannalondini, siga tey á Umhvørvisstovuni.

Í Danmark og í Grønlandi er als ikki loyvt at fylla køliskipanir við nýframleiddum freon, tí har er bert loyvt at selja endurvunnið.

- Í Føroyum er einki slíkt krav, og tí eru pengar at spara hjá teimum, sum keypa freon í Føroyum, men tað er sjálvsagt, at tann bíligara loysning verður vald, sigur Umhvørvisstovan.

### Vilja hava tiltøk

Umhvørvisstovan hevur nú mælt landsstýrinum at gera reglar í gildi, sum minka um føroyska útlátið av ozonoyðandi evnum. Landsstýriskvinnan í umhvørvismálum, Helena Dam á Neystabø, tók undir við tilmælinum og hevði í umbúna at seta Montreal sáttmálan í gildi í Føroyum, sum hevur ásetingar um útlátið ozon-oyðandi evnum.

Endamálið var er eisini at seta kunngerð í gildi, sum tálmar útlátið av ozonoyðandi evnum umborð á skipum og at seta reglar um, at minka nýtsluna av ozonoyðandi evnum fyri at leggja um til aðrar skipanir, sum ikki dálka umhvørvið.

Samstundis var ætlanin at gera reglur um, at tað einans skal vera loyvt at nýta endurvunnið endurvunnið Freon í Føroyum.




*Talvan vísir, hvussu nógv ozon-oyðandi freon føroyingar hava innflutt tey seinastu árini*